## DAGSINS MEINING

# Spenningur so tað forslær

Komandi løgtingsval verður spennandi í allar mátar. Ikki bara hvussu ein møguliga samgonga fer at síggja út, men eisini hvussu tey einstøku valdømini verða mannað. Og í síðsta enda eru tað oftani tey smærri og bíligu valdømini, sum kunnu avgera alla heildarmyndina, ja gera av, hvør flokkur ella hvørjir flokkar koma at mynda landsstýrið.

Størsti spenningurin hesaferð man verða vendur móti valdømunum Sandoy, Vágar og Norðstreymoy. Vit fara á hesum stað komandi bløðini at hyggja nærri at nøkrum av teimum valdømunum, har broytingar kunnu væntast. Broytingar, sum aftur kunnu fáa stóran týdning fyri, hvør kemur at sita í Tinganesi næsta skeiðið.

Taka vit Sandoynna, so eru har tríggir flokkar, sum stríðast um teir báðar tingmenninar. Seinast fingu A og E menninar, næstseinast fingu A og C menninar og soleiðis hevur gingið aftur og fram øll árini. Hesaferð er sannlíkt, at tað verður eitt ella annað skifti í oynni. Hetta einamest av at stóri atkvøðuslúkarin hjá A ikki stillar uppaftur hesaferð. Tað kann taka beinini undan A í oynni. Tað er so heldur einki dulsmál, at C liggur uppá lúr og vil gera alt fyri at vinna sær sessin aftur. Jógvan Adolf Johannesen, sum skopuningar serstakliga men eisini aðrir sandoyingar, eitt nú dalbingar, hava stuðlað trúliga í nógv ár, stillar ikki upp hesaferð. Men tað ger harafturímóti sjálvur bygdarráðsformaðurin í Skopun, Gerhard Lognberg. Okkurt kundi týtt uppá, at bygdafólkið fer at savna seg um hann, nú bygdin sum er ongan tingmann hevur. Hyggja vit so eftir E, so hevur flokkurin eina sera sterka støðu heima á Sandi. Og nú vísir uppstillingin, at hann stillar heilar tveir kandidatar upp í Skopun eisini. Við fyrsta eygnakast skuldi man trúð, at hetta kann skapa Lognberg trupulleikar. Hinvegin kann eisini sigast, at við at stilla tvey valevni upp í Skopun hevur E í veruleikanum longu uppá forhond tryggjað sínum kandidati á Sandi sessin. Tað kann gera, at skopuningar fara at savna seg um tað valevnið í bygdini, sum hevur bestu møguleikar at koma inn á ting at umboða bygdina og oynna sjálvandi. Uppstillingin hjá E í Skopun tykist tí meira taktisk, tí hon tryggjar harvið verandi tingmanninum Páll á Reynatúgvu annan sessin. Um E við at seta tveir mans á listan í Skopun ætlar at seta ein kíla inn í javnaðarleirin í bygdini og taka frá honum fyri harvið at tryggja fólkafloksmanninum á Sandi er ein annar spurningur. Tað kann sjálvandi vera ein landspolitisk taktisk avgerð. At E heldur sær ein sterkan A-flokk eftir valið, heldur enn ein alt ov sterkan C-flokk. Men tað kann gerast ein boomerangur, tí sum sagt er nú Lognberg besti garanturin hjá skopuningum at fáa sín mann á ting. So tann møguliga taktiska manøvran hjá E kann vera við til at tryggja C sigur á løgtingsvalinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kósin er sett

**Súni í Hjøllum**



Seinastu árini hava alsamt fleiri ásannað, at ríkisrættarliga støða Føroya er ein vavgreytur. Fyrst í nítiárunum varð prógvað ferð eftir ferð, at vit livdu í einum ábyrgdarleysum og ótryggum samfelag, sum rakti tey veikastu meinast

Føroyingar vórðu bundnir niður av politiskum krepputiltøkum, sum høvdu við sær, at fleiri túsund føroyingar vórðu noyddir at fara frá húsi og heimi. So at siga ongin hevði álit á samfelagsskipanini - hvørki í Føroyum, Danmark ella í útheiminum.

Búskapurin og vinnulívið í Føroyum vórðu við tíðini vorðin alsamt meira avlagað, so hvørt sum pengastreymurin úr Danmark øktist. Føgru orðini um, at hetta var hjálp til sjálvhjálp, hildu ikki. Avleiðingin varð stutt sagt, at vinnulívið í stóran mun als ikki stóð á egnum beinum, men hóraði einans undan, tí almennur rakstarstuðul varð latin. Á henda hátt hevði vinnulívið ongar tryggar karmar at menna seg undir.

Á løgtingsvalinum 30. april 1998 bjóðaði tjóðveldisflokkurin seg fram til at endurreisa samfelagið á nýggjum grundvølli. Tjóðveldisflokkurin gjørdist størsti flokkur á tingi, og flokkurin fekk sostatt álitisváttan frá veljarunum saman við øðrum góðum kreftum í okkara landi at skipa eitt føroyskt demokratiskt samfelag, har øllum borgarum verður tryggjað grundleggjandi og javnbjóðis rættindi – rættindi, sum ríkisfelagsskapurin við Danmark ikki hevði megnað at tryggja.

Eftir valið eydnaðist tjóðveldisflokkinum at koma í samgongu, og sjálvstýrisinnað fólk í Føroyum kunnu nú staðfesta, at søguliga "Samgonguskjalið" setti ferð á skipaðu loysingina. Vit er mong, sum høvdu hugsað okkum, at tað gekk skjótari, men føroyingar hava ongantíð áður verið so nær einum sjálvberandi búskapi.

Føroyingar eru eitt dugnaligt og arbeiðssamt fólk. Nú hava vit eisini eitt stolt og sjálvberandi vinnulív. Nú hava vit sum fólk veruliga møguleika at seta okkum greið mál á øllum samfelagsøkjum – fyri allar føroyingar, yngri sum eldri. Frælsiskósin er sett, men langt er á mál.

Sterkar kreftir vilja nú leggja stilt og venda aftur til tað ótryggja sambandið, ið tekur alla ábyrgd burtur. Vinna hesa røddir løgtingsvalið, býður ikki bøtur, vit falla aftur í heimastýrisgarðin og studningsmeldurin, sum leiddi land og fólk út í ófrælsi og fátækradømi.

Tað er mín vón, at allar góðar sjálvstýrishugaðar kreftir í landi okkara standa saman um frælsisstrembanina.

Frælsiskósin verður hildin við tjóðveldisflokkinum í landsins leiðslu!

# Tjóðveldisflokkurin súltar samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði

**Finnleif Guttesen**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum í Suðuroy*
*fg800@post.olivant.fo*



Hetta er einasta niðurstøða, ið suðringar kunnu koma til, eftir at hava hoyrt hvat umboðið fyri Tjóðveldisflokkin í Suðuroy segði í løgtingssalinum 14. mars 2002.

Tað er eitt vónbrot fyri allar suðuroyingar, at staðfesta, at Tjóðveldisflokkurin er komin til eina slíka niðurstøðu, tí eg trúði, at Tjóðveldisflokkurin tók undir við Sambandsflokkinum, at samferðsluhavnin skuldi verða liðugt bygd, tá ið ein nýggjur SMYRIL er klárur.

Hetta vísur suðringum hvat teir kunna vænta sær av Tjóðveldisflokkinum og er hetta hugstoyt og ørkymlandi fyri okkum øll, men kanska ikki so óvænta.

Tjóðveldisumboðið í Suðuroy sigur, at samferðsluhavnin kann byggjast tá ið tunnilin Øravík-Hov ferð í gongd, vantandi ár 2004, tí tilfari frá tunlinum skal brúkast til samferðsluhavnina á Trongisvágsfyrði, alt annað er burturvið. T.v.s, at ein samferðsluhavn í besta lagið kann verða liðug ár 2007-2008, tí arbeiðið uppá tunnil tekur eftir verandi ætlan 3-4 ár.

Sambandsflokkurin atkvøður fyri verklagslógini um havnabyggin í Vági og fegnast allir suðringar um, at havnaviðurskiftini her blíva munandi betri.

Sambandsflokkurin tekur undir við, at samferðsluhavnin á Trongisvágsfyri er liðug áðrenn nýggjur SMYRIL er liðugur. Hetta arbeiði má byrja longu í vetur fyri at náa á mál og vil tað siga, at verklagslóg fyri samferðsluhavn skal viðtakast sum skjótast.

Sambandsflokkurin kann eisini taka undir við, at tilfari frá tunlinum Øravík-Hov verður brúkt til útfylling, men so skal arbeiðið uppá tunnilin Øravík-Hov byrja longu nú í vetur.

At Tjóðveldisflokkurin saman við hinum flokkunum, hevur tikið undir við, at suðringar fáa eitt gott skip, sum siglur skjótt, er at glaðast um. Men at Tjóðveldisflokkurin fer at bjóða suðringum líka langa siglingstíð sum nú, er eitt stórt vónbrot fyri allar Suðuroyingar og allar Føroyingar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eftirlønarreformur

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins í Sandoy*



Sitandi samgonga setti sær fyri at loysa tey eftirhondini sera fløktu viðurskiftini á eftirlønarøkinum - ella pensiónsøkinum, sum vit vanliga umtala málið.

Men tað eyðnaðist ikki sitandi samgongu at semjast um ein leist, at loysa hesar trupuleikar eftir. Onkur flokkur vildi bert hava samhaldsfasta pensión, onkur annar vildi als ikki hava samhaldsfastar loysnir, men bert sokallaðar fólkatryggingarloysnir, har hvør eigur sítt.

Ein varandi loysn eigur helst at umfata bæði elementini, tað vil siga samhaldsfastar grundpensiónir fyri øll við møguleika fyri privatum yvirbygningi, um fólk ynskja og orka at gjalda til tað.

Eisini er neyðugt at umhugsa, hvussu eftirlønirnar upp á longri sikt verða skildar frá landskassanum og løgtingsins fíggjarlóg.

Í flestu vestanlondum hava størnirnar ásannað, at nú fólk liva longur og miðalaldurin er væl hægri enn fyrr, samstundis sum talið av nýføðingum ikki er vaksi tilsvarandi, so vera færri fólk at gjalda fólkapensión, so sum vit kenna hana, til alt vaksandi talið av fólkapensiónistum.

Tí hevur verið umhugsað og summa staðir gjøgnumført aðrar loysnir, har tey komandi ættarliðini sjálvi uppspara til egnu eftirløn gjøgnum alt tað arbeiðsføra lívið. Men hendan loysn tekur - eftir vanligum tænastumannaprinsippum - umleið 37 ár at uppspara til egnu eftirløn.

Eisini tí má ein loysn umfata bæði stuttsiktaðar loysnir fyri núverandi og skjóttkomandi pensiónistar, og eisini eina langsiktaða loysn fyri tey, sum eru ung í dag.

Tann fyrsta loysnin má tí verða, at prístalstryggja og hækka verandi fólkapensión - bæði grundupphæddina og møguliga eisini viðbøtur.

Tann næsta loysnin er at hækka inngjaldið til SAMHALDSFASTA bæði frá løntakara og frá arbeiðsgevara. Harumframt er ein møguleiki, at landskassin ger eitt eingangs-inngjald í Samhaldsfasta at styrkja stovnsfæðið.

Samhaldsfastið útgjaldar til øll - eins stórar upphædd frá 67. árið. Upp á longri sikt, tá Samhaldsfasti er nóg væl styrktur og útbygdur við inngjøldum, so kann hesin grunnur møguliga avloysa fólkapensiónina heilt, men tað er ikki møguligt at siga nakað herum nú.

Harumframt eiga øll at hava møguleika at gera uppsparing - við skattafyrimuni - í aðrar eftirlønarskipanir gjøgnum fakfeløg ella gjøgnum peningastovnar og tryggingarfeløg sum kapitalpensiónir ella ratupensiónir. Og á hesum økinum eigur at vera frælsi til sjálvur at velja, hvat tann einstakið ynskir.

Uppgávan hjá tí almenna - Løgtingi og Landsstýri - er, at koma við hóskandi lóggávu um økið - ein EFTIRLØNAR-REFORMI. Av hesum partinum eigur tað almenna at lóggeva og tryggja hvørjum einstøkum eina eftirløn, sum hann ella hon kann liva av á ellisárum, eina grundpensión, sum má vera samhaldsføst. Altso fólkapensión og Samhaldsfasta.

Tíverri hava teir flokkar, sum áttu meirilutan á tingi saman, ikki megna at loyst hettar stóra mál, sum viðkemur hvørjum einstakum føroyingi.

Eisini hettar stórmál hava teir latið til komandi Løgting og Landsstýri at loysa, tí Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ikki kundu semjast um leistin fyri komandi eftirlønarreforminum.

Javnaðarflokkurin fer at leggja størstu orku í at loysa hettar málið sum skjótast eftir valið. Og Javnaðarflokkurin fer at leggja vekt í at loysa málið fyri allar føroyingar, bæði teir, sum nú eru pensiónistar, tey sum vera tað komandi árini og tey ungu í dag.

Og loysnin eigur at vera ein samhaldsføst grundpensión fyri øll á einum støði, sum fólk kunna liva av sum pensiónistar. Og tann pensiónin má sum frálíður liggja einamest uttanfyri landskassan - helst í tí Samhaldsfasta grunninum.

Síðan kann lóggevast fyri, hvørjir fríir møguleikar vera at hava eftirlønar-uppsparingar omanyvir ta tvungnu, samhaldsføstu grundpensiónina.

Hettar er eitt mál, sum nú eigur at vera loyst. Hettar málið fer Javnaðarflokkurin at loysa sum skjótast eftir valið 30. apríl 2002.

# Hví velja Sambandsflokkin?

**Karl Olgar Joensen**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Av tí einføldu orsøk, at flokkurin førir ein greiðan politikk til gagns fyri okkara samfelag og fólkið alt, innanfyri karmarnar av ríkisfelagsskapinum..

**Loysingarpolitikkur**
Loysingarflokkarnir hava leikað í seinastu 4 árini um yvirtøkur og loysing, uttan at hugsa um avleiðingarnar.

Vit minnast tá Postverkið skuldi yvirtakast. Sagt varð, at raksturin av Postverkinum var ein sonn gullgruba hjá dønum, men hvussu nógv hevur Postverkið givið okkara samfelag og hvussu er støðan í dag?

Eitt mál, ið hevur verið nógv frammi seinastu tíðina er flogvallamálið. Tað skal eisini yvirtakast, men ikki fyrr enn danir hava gjørt alt í besta stand og goldið fyri tað. Ein má spyrja, eru hetta loysingarfólk við stoltleika, ið stýra okkara landi?

**Gulltíðir**
Vit hava havt gulltíðir í fylgjandi ár. Vit kenna sanniliga eisini til ringar tíðir. Tað skal tíverri lítið til, svíkur fiskiskapurin, ja so kann skjótt verða galið. Enn er fiskivinnan alt avgerandi fyri livi-umstøðurnar í landinum.

Sum nevnt hava vit havt gulltíðir. Taðr hevur ført við sær, at samgongan hevur havt nógvan pening at arbeiða við. Hyggja vit so eftir, hvat er komið av skafti hesi 4 árini, so eru sjálvsagt nøkur mál framd, men alt ov nógv tíð er farin til at sjabba um yvirtøkur og loysing.

Hugsa vit um tey gomlu, sum hava gjørt sína skyldu til frama fyri okkum øll, ja so verða ikki nógvir tankar untir teimum, tó, nú beint undan vali fingu tey nakrar fáar krónur omaná pensiónina.

**Uppskot Sambandsfloksins**
Sambandsflokkurin hevur fleiri ferðir lagt uppskot fram á ting um at avtaka oljuavgjaldið, men báðar ferðir varð tað felt. Hetta hevði verið ein munandi bæti hjá pensionistunum og okkum øllum. Tað er at undrast á, at hetta uppskotið ikki varð samtykt, tá hugsa verður um at tosið, ið verði hevur um tann nógva pening, ið landskassin eigur.

Set X við B – so koma vit langan veg.

# Grundsjónarmið Javnaðarfloksins

**William Max Hansen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Føroya Javnaðarflokkur sum stendur óheftur av øllum útlendskum politiskum flokkum, men í dyggastu samvinnu við og á grundarlagi alheims sosialismunnar, vil, at Føroyar skulu byggjast sum eitt sosialistisk vælferðarsamfelag.

Flokkurin ásannar, at Føroya land er Føroya fólks ogn. Henda ogn umfatar eisini landgrunnin og undirgrundina.

Út frá hesari grundstøðu heldur flokkurin tað vera skyldu teirra, ið hava ta stjórnarligu ábyrgdina, at skipa so fyri, at hendan ogn fólksins verður at gera hina mestu framleiðslu og úrtøku, ið allir landsins borgarar eiga javnrætt til.

Alt samfelagsgagnligt virksemi má skipast út frá umsorgan fyri felags áhugamálum og fyri at fremja vælferð fólksins. Øll menniskju skulu hava somu rættindi at taka lut í arbeiðinum fram móti størri vælferð og einum ríkari lívi.

Hetta kann bert fremjast í einum samfelag, har allar greinar av samfelagslívinum eru í væl skipaðari samvinnu undir vilja og eftirliti fólksins. Øllum skal tryggjast tað, ið er grundleggandi fyri lívseydnu menniskjans.

Øll stig á leiðini fram móti hesum samfelag skulu fremjast á fólkaræðisligari grund. Fólkaræðið skal umfata alt samfelagslív, ikki minst hitt fíggjarliga. Her kann eg ikki lata vera við at nevna loysingarmennirnar. Teir vóru komnir so nær, at tað manglaði næstan onki í,. Hesir somu menn umboðaðu minni en 25% av Føroya fólki. Hvat hugsa teir fyri sær?

Fólkræðið er stýri skapað av fólkinum gjøgnum tess fólkavaldu umboð. Tað verður eingin politiskur mynduleiki af finna, ið ikki er sprottin av frælsum loyniligum valum.

Fyri at verja og tryggja fólkaræðið er tað neyðugt, at uppaling til fólkaræði verður sett frammalaga í heimi og skúla, á arbeiðsplássunum, soleiðis at hon verður at kynda undir ábyrgdarkenslur og skyldur hjá tí einstaka ímóti medmenniskjum og samfelagnum sum heild.

Á búskaparliga økinum - fíggjarliga, vinnuliga, búnaðarliga og á annan hátt - má samfelagið ganga á odda og taka tey stig, ið neyðug eru fyri at náa málinum: størst møgulig framleiðsla og rættvíst býti av ágóðanum. Hetta verður at loysa á ymiskan hátt á teimun ymisku vinnuligu, fíggjarligu, búnaðarligu og samfelagsligu økjunum.

Í summum førum er tað neyðugt, at landið átekur sær partar av hinum búskaparliga virkseminum.

Á summum økjum er rættast at framleiðsla og handil verða rikin á samvinnugrundarlagi.

Á øðrum økjum er privat drift betur hóskandi.

Avgerandi fyri hina praktisku loysnina í hvørjum einstøkum føri verður hvat gagnar heildini, fólki og landi best.

Kommunur og privatfyritakssemi mugu fylkjast og ganga á odda, tá tað ræður um at skapa áhuga fyri og gera nyttu burtur úr teimum møguleikum, ið finnast á ávísum staði ella støðum eins og innan fyri nærri avmarkað øki. Fylking av øllum góðum og skapandi kreftum í bestu samvinnu í felags málum verða at skapa størri og ríkari framgongd fyri fólk og land.

Javnaðarflokkurin er í móti privatiseringum av almennum stovnum og fyritøkum, um motivið er privatisering fyri privatiseringina skuld, og serliga teimun stovnum sum ár undan ári hava givið eitt stórt avkast til landshúsarhaldið.

Nei, vit hava øll í felag keypt Føroya Banka aftur. Lat okkum nú í felag fáa tað, hann kann kasta av sær. Søla av fólksins ognum fer at hava við sær, at: landið missir inntøkur, eftirlitsmøguleikarnir hjá almennu mynduleikunum verða skerdir ella detta heilt burtur.

Rokningin fyri ineffektivitet verður beinleiðis send borgaranum, vandi er fyri, at sterkastu fyritøkurnar enda á útlendskum hondum.

Javnaðarflokkurin vil leggja út uppgávur til onnur at røkja, treyta av betri og bíligari tænastu.

Útlicitering kann vera gott amboð, verður tað brúkt við skili. Tá kann tað víðka tænastustøðið, virka økismennandi og veita serligan fakkunnleika, sum tað almenna ikki hevur.

Javnaðarflokkurin sær einki endamál í at seta privat monopol fyri alment monopol, sum kann vera eitt av vandamálunum við útlicitering. Men vit fara undir ongum umstøðum at útlicitera umsorgaruppgávur.

Flokkurin vil virka fyri m.a. príseftirliti, rættvísari sosiallóggávu, tað verði seg einkjupensión, fólkapensión v.m., eins og skattaálegging. Skattaálegging hevur til endamáls at úvega hin neyðuga peningin til útbygging samfelagsins og fremjan av samfelagsligum áhugamálum. Øll skattaálegging má fara fram á tann hátt, at hon ikki forðar virkishugi ímillum manna.